


Nr. 3 1. februar 2026 86. árg.

# Pauli Nolsøe á Tanganum – og Blái Krossur

Í Heimamissónssøguni hjá Chr. Høj greiðir Josefina Strøm Nielsen, fyrrver. ljósmóðir, ættað úr Trongisvági, soleiðis frá: Eg minnist, tá byrjað varð at halda blákrossmøtir á Tvøroyri. Tað var Pauli Nolsøe, Pauli á Tanganum, ið fekk hetta í lag. Tað er ein serlig søga um hann. Hann var giftur við eini keypsmansdóttur úr Trongisvági, ið æt Jetta. Sjálvur var hann ættaður úr Garði í Trongisvági. Pauli hevði eitt keypmansvirki, har ið tey eisini seldu brennivín, og sjálvur kom hann at nýta nógv av tí váta slagnum.

Eitt systkinabarn móður mína, ein blaðungur drongur, var krambakallur hjá honum. So var tað dagurin, ið nógv hevur verið tosað um á Tvøroyri. Pauli sat um náttina í krambúðini í fyllskapi sínum. Hann var so ógvuliga góður við Jettu, konuna, hóast hann var so forfallin. Tá hevði hann ein dreym, sum hann situr og dúrar. Hann sær, at Guds einglar fara avstað við Jettu. Hon kemur til himmalsins portur. Hann kemur aftaná. Og tá ið tey koma til portrið, siga einglarnir við hann: „Nei, tú sleppur ikki inn. Tú ert ikki nóg reinur.“ So vaknaði hann, og hann var so skakaður, at tá ið

krambakallurin kemur oman í handilin um morgunin, var Pauli ikki farin í song. Hann sigur tá við hann:

„Frá hesum degi selji eg ikki meira brennivín!“ Og so biður hann henda unga drongin koyra alt burtur. Og hann fór við einari tunnu fyri og aðrari eftir oman á sjógv. Og roykurin av brennivíninum kendist í fleiri dagar í bygdini. Eisini fløskur av ymiskum slagi fóru sama vegin. Hin trúði, at keypmaðurin gjørdi tað í ørviti. „Nei, hetta er álvara mítt. Tú skalt gera tað, tí eg selji ikki meiri brennivín!“ Hann vildi sleppa har, sum Jetta fór.

Men hvussu var ella ikki, Pauli gjørdist ein umvendur maður og fór at arbeiða í Bláa Krossi. Har bar hann so fram vitnisburð sín. Hann var góður talari og sera bíbliukønur.

*Josefina Strøm-Nielsen.*

# So regluliga tíðarhjólið melur

*Lag: Hin harða krossin til ta síðstu hvílu*

So regluliga tíðarhjólið melur,
tað tímar, dagar, ár og øldir telur,
alt meðan ættir koma, eldast, fara,
sjálvt ikki tíðin heldur við skal vara.

Kring allan henda mikla jarðarkringin
fer skari út og annar inn í ringin,
har lystiliga verður kvøðið, dansað,
mong reystmenni har verða krýnd og kransað.

Men dansitíðin víst skal enda fáa,
tað gamalt er og greitt í bókum spáað;
tá síðsta ørindið so verður kvøðið,

tá verður mikil ótti, mikil øði.

Tí hav og heimur hvørva – alt er farið!
á nýggju jørð skal savnast stórur skari,
har lov og tøkk tey Lambinum fram bera,
at teirra Frelsari hann vildi vera.

Og hvør tann sál, sum Krist í trúnni hevur,
hon er ei deyð, men bert í moldum svevur,
tí mikla páskadag hon upp skal rísa,
í Himlinum hon Lambi Guds skal prísa.

**P.J. Sigvardsen**
**á hásumri 2024**

# Jesus gongur framvið

**Sten Sørensen,**
**blaðstjóri**

Luk. 18,35–43 síggja vit eitt lítið brot av lívinum í Ísrael um hesa tíðina. Páskirnar nærkast, og pílagrímarnir ferðast í flokkum til Jerusalems. Ferðin kundi vara í fleiri dagar, og ofta høvdu tey rabbinarar við sær, sum undirvístu, meðan tey gingu til Jerusalems. Jesus undirvísti á hesi ferðini, og fólkið flokkaðist uttan um hann. Hetta hevur verið ein spennandi ferð saman við Jesusi.

Tað var í mannamúgvuni við vegjaðaran í Jeriko, at tann blindi maðurin sat. Hann hoyrir ljóðið frá mannamúgvuni, og hann spyr, hvat ið hetta er. Hann fær at vita, at tað er Jesus, sum gongur framvið.

Tann blindi fór at rópa: „Jesus, sonur Dávids, miskunna mær!“ Fólkini, sum hoyrdu Jesus undirvísa, hóttu at honum at fáa hann at tiga, tí hann órógvaði tey. Men hann letur tey ikki steðga sær. Hann veit, at um nøkur sekund er Jesus farin framvið, tí ræður um at kvika sær, so hann rópar nógv harðari. Í grundtekstini

merkir orðið eitt skríggj, næstan sum eitt skríggj frá einum dýri.

So steðgar Jesus. Hann bað tey leiða henda blinda til sín! Tað var okkurt í rópinum, sum rørdi Jesu hjarta! Eg haldi, at Jesusi dámar okkara ógvisliga neyðarróp.

Um eitt menniskja hevur brúk fyri einum undri, er tað hesin andin, tey mugu hava. Ein mildur, kenslusamur longsul dregur ikki Guds kraft fram. Men tann brennandi, sterki longsulin úr hjartadýpinum hjá einum menniskja verður bønhoyrdur!

Eg kenni á mær, at eg má rópa út mína neyð og siga Jesusi um mín tørv: „Kom ímillum okkum við størri styrki!!! OKKUM TØRVAR TEG!“

Hesin bíbliuteksturin sigur okkum nógv um Jesus. Hann leggur fúsur eina løtu undirvísingina til viks, sum hann sum rabbi hevði eftir vegnum til Jerusalems. Tað var okkurt, sum hevði størri týdning. Neyðarrópið hjá manninum steðgaði Jesusi, og talan var gloymd.

Fyri Jesus hevði tað størri týdning at fara til verka enn at tala. Orð komu altíð í aðru røð, aftan á gerningarnar. Her var eitt menniskja í neyð. Talan mátti setast á steðg, og tænastan setast í gongd. Soleiðis er Jesus!

Menniskju hávirða ein mann við stórum tonkum, men tey elska ein mann við einum stórum hjarta.

**Effie Campbell** umsetti.

## Fyridømi ella staðgongumaður

Eftir eitt møti kom ein maður yvir at tosa við talaran, dr. M. Stearns sála. Hann segði: Mær dámdi ikki talu tygara. Eg brýggi meg ikki um krossin. Eg haldi, at staðin fyri at prædika Kristi deyða á krossinum, hevði tað verið nógv betri at prædika Kristus sum lærara og fyridømi.

– Íðan, høvdu tygum viljað verið villigur at fylgt honum, um eg prædiki Kristus sum fyridømi? spurdi dr. Stearns. – Tað hevði eg viljað, svaraði maðurin. – Eg vildi fylgt í fótasporum hansara.

– Íðan, segði dr. Stearns, – latum okkum so taka fyrsta stigið. „Hann, sum ikki gjørdi synd.“ Kunnu tygum stíga tað stigið? Maðurin gjørdist ørkymlaður. – Nei, segði hann, – eg syndi, tað má eg viðganga.

– Íðan, um tað er so, segði dr. Stearns, – tá verður tygara fyrsti og størsti tørvur av Kristusi ikki sum fyridømi, men sum Frelsara.

Tað er hetta, sum er høvuðstørvurin hjá hvørjum einasta menniskja. ***„Krigsropet“. – Effie Campbell*** umsetti.

Lot fekk boð um at savna sína familju og flýggja út úr býnum. Versynirnir hildu, at Lot tvætlaði. Tað eyðkennir fráfallin kristin, at tá ið tey tala, er eingin andaligur myndugleiki í tí, sum verður sagt. Tey virka láturlig. ***e.c. ums.***

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| |
|---|
| 1. feb. **Tekstur:** 4 Mós. 21,4-9 og Jóh. 3,16-17 **Bíbliuorð:** Jóh. 3,15 |
| 8. feb. **Tekstur:** 5 Mós. 26,1-11 **Bíbliuorð:** 5 Mós. 26,11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




Nr. 4 15. februar 2026 86. árg.

# Kallið

***„Spyr tó fyrst, hvat Harrin sigur.“***
***1. Kong. 22,5 & 2. Krøn. 18,4***

Ja, tað er av alstórum týdningi, at vit spyrja Harran, hvat ið vit skulu velja í øllum lívsins viðurskiftum. Tí Hann veit best. Hann hevur lagt ymisk evni niður í okkum, og skulu tey koma til sín fulla rætt, mugu vit velja beint. Tað umfatar allar støður í lívinum: útbúgving, hjúnafelaga, bústað o.so.fr.

Fyri árum síðani, tá ið vit øll keyptu og lurtaðu eftir kasettu bondum, keypti eg fýra bond, har norðmaðurin Einar Lundby talaði. Hesin maður var lækni, men hann man vera best kendur sum prædikumaður. Hann var høgt í metum sum ein Harrans boðberi og sálarhirði. Hansara boðskapur var ikki tóm orð, men eitt lív í nærsamband við tann Harra, sum hann livdi fyri og tænti.

Í einari talu síni nevndi hann nakað, sum eg ongantíð havi kunnað gloymt. Hann greiddi frá, at hann, sum tá var ein ung lingi, hevði verið á einari legu. Nógvir unglingar góvu tá Jesusi lív sítt og vildu brúka tað í Hansara tænastu. Fleiri ætlaðu sær út í heidningalond

at bera hin glaða boðskapin.

Í tokinum á veg heim aftur sat hann og bað. Hann hevði eisini ætlað sær út, har Jesus ikki var kendur, men hann visti ikki rættiliga hvar. So bað hann til Harran og segði: „Harri, sig mær, hvar skal eg fara fyri teg? Nú lati eg Bíbliu mína upp og peiki á okkurt skriftstað, lat tað so vera títt svar til mín.“

So læt hann eyguni upp og sá, at hann var komin niður á Ezekiel 3,5–6. Høvuðsinnihaldið í hesum báðum versum er:

„… tú verður ikki sendur til fólkasløg, ið hava torskilt mál, sum tú ikki skilir. Sanniliga, Eg sendi teg til teirra, sum vilja lurta eftir tær, til Ísraels hús.“

So hevði hann fingið greið boð um, at hann skuldi virkað í egna landi sínum og ikki teirra millum, sum høvdu eitt fremmant mál.

**Effie Campbell.**

# Tað er óivað okkurt, Gud vil … *Ludvig Karlsen, tann ið stovnaði Evangeliesenteret*

Í 1985 kundu Lise, Ludvig og Vera doyð í einari bilvanlukku, um ikki eitt ljóst skapilsi hevði steðgað teimum, tá ið tey vóru á heimleið eftir eina møtirøð í Kongsvinger.

„Eg koyrdi heldur skjótt. Tað eigur tú ikki at gera. Men fá fólk vóru á vegnum, og seint var á kvøldi. Eg mundi koyra 90 km um tíman, tá ið vit komu til ein smalan bygdarveg millum Vormsund og Eidsvoll. Mitt uppi í brekkuni stóð brádliga eitt ljóst skepilsi, ein eingil. Hann var prúður og fylti næstan allan vegin. Ein ovurstórur eingil.

Øll trý sóu vit eingilin. Vera, yngsta dóttirin, var hin

fyrsta, sum fekk orðið fyri seg: „Á pápi, nú fari eg ongantíð at ivast aftur um Gud.“

Eg skalv, tí eingilin var ómetaliga nær. Ljósið frá honum var so sterkt, at tú næstan kendi, sum fór tað gjøgnum mønu og merg. Samstundis sum vit høvdu ærufrykt, so merktu vit, at hetta var okkurt, sum vildi okkum væl.

Tá ið vit høvdu steðgað bilinum, lyfti eingilin seg upp frá brekkuni og kom sveimandi uppi yvir bilinum við flákrandi kyrtli, áðrenn hann hvarv upp móti himli.

Hetta var so sjáldsamt. Vit blivu øll trý illa við, men samstundis hildu vit, at tað var óivað okkurt, ið Gud vildi. Eg fór aftur at koyra.

Handan svingið var ein smøl brúgv, sum var uppi yvir einari á. Tá kom ein bilur móti okkum við fullari ferð. Um vit ikki høvdu steðgað uppi í brekkuni, so høvdu vit møtt hesum bilinum mitt á tí smølu brúnni. Um tað var hent, so høvdu vit ikki havt ein livandi kjans. Tá høvdu vit øll trý verið deyð. Ein ungur drongur koyrdi hin bilin, og hann koyrdi ómetaliga skjótt. Svitsj, so var hann farin fram við okkum. So eg haldi, at har sendi Gud ein eingil at ansa eftir okkum á vegnum, so vit skuldu fáa loyvi at ferðast víða um og tæna Gudi.“

„Tí einglum sínum boð hann gevur teg at varða á øllum tínum leiðum.“ Sálm. 91,11.

**Effie Campbell** umsetti.

# Maðurin við tunglyndi

Ein ungur maður í Amerika hevði tunglyndi. Fleiri læknar høvdu kannað hann; men teir funnu ikki atvoldina til hansara hugtyngslu. Foreldrini sendu tí sonin til dr. Torrey, sum var nervalækni, og sum eisini boðaði Guds orð.

Tað leið móti kvøldi, tá ið hesin ungi maðurin kom til

heimið hjá læknanum. Tá ið teir sótu við nátturðaborðið, legði dr. Torrey fyri og spurdi, um hann trúði, at frásagnirnar í Bíbliuni vóru álítandi.

„Jú, tí trúgvi eg,“ svaraði ungi maðurin.

„Heldur tú, at vit kunnu líta á tað, sum Jesus sigur í Jóh. 6,37: „Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur.““ „Jú, eg haldi, at tað er álítandi.“

„Gott,“ segði dr. Torrey, „skulu vit so fara til hansara?“ „Nei, Guds orð talar ikki til mítt hjarta.“

„Íðan so, men Jesus segði ikki, at hann fór at taka ímóti okkum, tá ið Guds orð talaði til okkara hjarta. Hann segði: „Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur.““

„Ja, men vita tygum, mítt hjarta er gróthart og letur seg ikki ávirka av Guds orði.“

„Jesus segði ikki, at tann, sum kom til hansara við einum bleytum og ávirkiligum hjarta, skuldi hann ongantíð reka burtur; men hann segði: „Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur.““

„Ja, tað kann væl vera; men eg brýggi meg ikki um at koma til hansara.“

„Tað er møguligt,“ segði dr. Torrey, „men Jesus segði ikki, at tann, sum brýggjaði seg um at koma til hansara, fór hann ongantíð at reka burtur; men hann segði: „Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur.““

Tann ungi maðurin sat eina løtu hugsanarsamur og hugdi fram fyri seg.

So segði dr. Torrey við hann: „Skulu vit nú báðir fara til hansara?“

Ein løta gekk, so fór hin ungi maðurin á føtur, fór yvir til sofuna og boygdi knø har. Dr. Torrey fall á knæ undir liðini á honum og segði: „Nú skal eg biðja; men tú skalt taka hvønn setning uppaftur.“

Dr. Torrey fór at biðja, og hin ungi maðurin endurtók

alt, setning fyri setning, sum læknin segði: „Góði Jesus, tú sært, at hesin ungi maður kemur til tín eftir orði tínum í Jóhs. 6,37: „Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur.“ Hann trýr tær, at tú hevur tikið ímóti honum, og Harri, tú fert at styrkja og varðveita hann í tíðini, sum liggur fyri framman.“

Teir fóru nú á føtur, og dr. Torrey segði við hann: „Tá ið tú fert til songar í kvøld, kemur Satan til tín og sigur, at hetta, sum tú gjørdi í kvøld, var at lúgva fyri tær sjálvum, tað er heilaspuni at trúgva, at Jesus hevur tikið ímóti tær á ein so bíligan hátt. Uttan mun til, hvat ið hann sigur við teg at fáa teg at ivast um Frelsarans lyfti, skalt tú bara svara honum, at Jesus hevur sagt: „Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur,“ og hann vil eg líta á.““

Morgunin eftir við morunmatarborðið spurdi dr. Torrey hann beinanvegin, hvussu ið gingist hevði.

„Jú,“ svaraði hann, „tað gekst, sum tygum søgdu. Satan kom, og hann hevði ymiskar atfinningar; men eg helt fast við tað, sum Jesus hevði sagt. Nú havi eg frið við Gud, og eg eri eydnusamur, av tí at eg hoyri honum til.“

Kæri vinur, legg til merkis, at dr. Torrey tekur hetta lyftið hjá Jesusi og setir tað høgt oman fyri alt kjak. Far tú og ger so við. Halt fast í lyftini, Jesus hevur givið. Tey eru fyri teg og øll onnur, sum vilja taka ímóti honum.

**Effie Campbell umsetti.**

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

15. feb. **Tekstur:** Matt. 6,17-18 og 1 Sám. 16,4-13 **Bíbliuorð:** 1 Sám. 16,7c

22. feb. **Tekstur:** 4 Mós. 27,18 + 22-23 og Jós,1,1-9 **Bíbliuorð:** Jós. 1,5b

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74